TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Margarinfabrikkin

Margarinfabrikkin er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-19 ár).

Opið er gerandisdagar frá kl. 12.00-17.30 fyri børn, og frá kl. 18.00-22.00 fyri ung.

Margarinfabrikkin er framvegis í støðugari menning har roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum, ið rørist millum børn og ung. Samstundis verður roynt at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemið í húsinum.

www.fabrikkin.fo

# Leiðari og pedagogar

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir avloysara fyri leiðara í farloyvi og pedagogum til Margarinfabrikkina.

**Leiðari**
Starvið er avloysarastarv frá 1. august 2003 og eitt ár fram.

**Pedagogar**
Størvini svara til trý fulltíðarstørv at byrja 1. august 2003.

**Vit vænta**
at tú:
- ert áhugaður í at arbeiða við størri børnum og ungum
- ert opin, vísir ábyrgd og ert positivur
- hevur áhuga í skapanarevnum/er skapandi
- ert fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt
- vísir virðing fyri tínum medmenniskjum

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Petersen, tlf. 31 51 60 ella Henrik Andersen, tlf. 312217, millum kl. 13.00-18.00.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003. Viðmerk á umsóknina "Margarinfabrikkin".




# Fyribils ferðsla á Landssjúkrahúsinum

Í sambandi við útbyggingina av Landssjúkrahúsinum skal verandi vegur til skaðastovuna umleggjast, ístandgerast og hava nýggjar gongubreytir og nýtt asfalt.

Hetta hevur við sær, at verandi innkoyring verður stongd í eina tíð og ferðslan umløgd soleiðis, at koyrt verður inn til skaðastovuna norðanifrá framvið nýggja bygninginum á Landssjúkrahúsinum, sí mynd omanfyri.

Arbeiðið byrjar mánamorgunin 5. mai 2003 og tekur umleið 3 vikur.

BYGGILEIÐSLAN

i Sosialurin

Lýsið við brúktum bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo

http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo
http://www.sosialurin.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Skrivstovufólk

**Starvið**
Søkt verður eftir skrivstovufólki at seta 1. juni 2003.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur:
- Skrivstovuútbúgving
- Góðan teldukunnleika
- Kunnleika til bókhald
- Góð samstarvsevni

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Upplýsingar**
Fyrispurningar um starvið kunnu setast Svannu Justinussen.

**Umsókn**
Umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast til:

**Matrikulstovan**
Postboks 327
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Matrikulstovuni í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003.

*Matrikulstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Arbeiðsøkini á stovninum eru viðlíkahald av matriklinum, marknasetingar, útskiftingar, uppmálingar og kortlegging. Á stovninum starvast 18 fólk.*

# Frá Haldórsvíkar Avhaldsfelag

Eydnuhjól verður 2. hvítusunnudag tann 9. juni 2003.

Um nakar vil stuðla við lutum, verða teir móttinir við tøkk.

Lutirnir kunnu latast til ein av nevndarlimunum.

Paulivar tlf. 423317
Katrin tlf. 423471
Hallgerð tlf. 423368
Hansa tlf. 423348
Hjalma tlf. 423343

**Nevndin**

# Køksgenta

Køksgenta søkist.

**Tlf. 35 88 10 ella 21 31 45**

# Sproytikabina

klár til uppseting og 2 kompressarir til sølu.

**Sp/f R. D. bilar**
tlf. 424232

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Yvirlaborantur til Náttúruvísindadeildina

Søkt verður eftir yvirlaboranti til starvsstovuna á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum við setan frá 1. august 2003 at rokna.

**Starvið**
Starvið er 3/4- tíðar starv. Tað fevnir um:

- Planlegging, fyrisiting og arbeiðsfordeiling á starvsstovuni
- Fakligt og annað samskifti inn og út av starvsstovuni
- Eftirlit og bíleggingar av vørum
- Starvsstovuarbeiðið, so sum:
  - Kemiskar, fysiskar og mikrobiologiskar analysur
  - Framleiðslu av reagensum
- Ábyrgd og viðlíkahald av starvsstovutólum
- Heintan av prøvum til kanningar
- Faklig vegleiðing av studentum

**Førleiki**
Vit vænta at tú:
- ert laboratoriuteknikari ella laborantur við starvsroyndum
- hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- ert røkin
- hevur kunnleika til vanlig telduforrit, td Microsoft Office

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Magnussen á tel. 35 25 50 ella á teldupostadressu eydfinnm@setur.fo

**Løn**
Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, fl. V.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum, ævisøgu (curriculum vitae) og møguligum viðmælum, skulu vera Náttúruvísindadeildini í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2003. Umsóknir skulu sendast til: Náttúruvísindadeildin, Postrúm 2109, FO 165 Argir.

Á Náttúruvísindadeildini (NVD) á Fróðskaparsetrinum eru íalt 8 vísindastarvsfólk innan stødd-, alis-, evna-, lív-, hav-, jarðalis- og ravmagnsverkfrøði. Harumframt eru tvey starvstovufólk á starvsstovuni (hendan lýsingin er eftir øðrum teirra) og tvey skrivstovufólk í umsitingini. Í løtuni eru tríggjar Phd-verkætlanir í gongd á NVD, og eru tær innan seismiskar signalviðgerðarhættir og modellering av alduviðurskiftum við Føroyar. NVD veitir Bachelor of Science (BS) útbúgvingar innan lívfrøði, ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, kunningartøkni, teldufrøði og jarðalisfrøði. Undirvísingin verður veitt av starvsliðinum á NVD og av uml. 30 uttanseturs undirvísarum, ið eru á øðrum stovnum og virkjum bæði í Føroyum og uttanlands. Í løtuni eru um 35 studentar á NVD, harav 18 taka BS í kunningartøkni, skipað sum hálvtíðarlestur. Harafturat eru um 20, ið lesa einstakar lærugreinir.

# Fysioterapistovan Stimbur

Vit lata upp í nýggju hølum okkara
á Gripsvegi 28 (gamla bakaríið Hjá Gunleivi)
mikudagin 7. mai kl. 12.00

Opið hús verður týsdagin 6. mai
kl. 16.00 – 19.00. Øll eru vælkomin

**Beinta, Marjun, Ingilín og Durita**

FYSIOTERAPISTOVAN STIMBUR

Tel. 317677 • Fax 317665
Telefontíð: kl. 9.30 – 10.00 og 13.00 – 14.00
Teldupost: stimbur@post.olivant.fo

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Stuðulsfólkaskipanin** er partur av sosialu deild í kommununi. Hon hevur egnu umsiting og er skipað í tveimum deildum: *Serdeildin* tekur sær av børnum á dagstovni við varandi breki, menningartarni o.l., meðan *Familjudeildin* tekur sær av børnum 0-18 ár, sum hava aðrar trupulleikar.

Starvsfólk verða sett í starv í stuðulsliðnum og fáa eina ella fleiri uppgávur.

Arbeiðið gongur vanliga fyri seg á dagstovni ella frítíðarskúla og kann t.d. verða at stuðla einum ella fleiri børnum sum:
- hava talu- ella samskiftistrupulleikar
- eru rørslutarnaði
- ikki trívast ella mennast aldurssvarandi
- hava trupulleikar í sosiala samanspælinum
- hava DAMP ella SI-trupulleikar ella
- eru menningartarnaði, hava Down´s syndrom e.l.

www.torshavn.fo

# Stuðlar til Stuðulsfólkaskipanina

Søkt verður eftir fólki til Serdeildina og Familjudeildina at byrja 15. august 2003 ella eftir nærri avtalu. Størvini eru millum 20 og 40 tímar um vikuna.

**Størvini:**
- Eitt starv 40 tímar um vikuna í serstovuni í Øksnagerði, sum er eitt serligt tiltak fyri børn við kontakt- og samskiftistrupulleikum
- Eitt starv 25 tímar um vikuna hjá rørslutarnaðum barni í frítíðarskúla, har m.a. verður arbeitt við rørslumenning (Stuðulstímar hjá sama barni í skúlanum kunnu koma afturat frá Sernámsdeplinum)
- Fleiri størv 20 og 30 tímar um vikuna í barnagarði og frítíðarskúla hjá børnum, við ymiskum trupulleikum, har arbeitt verður við t.d. málsligu, rørsluligu ella sosialu menningini
- Starv sum fastur avloysari á Serdeildini

**Vit kunnu bjóða**
Eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt, men verður partur av einari skipan við basisbólkum og starvsfólkamenning, og tú hevur fast samband við ein pedagogiskan ráðgeva

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at umsøkjarin hevur námsfrøðiliga ella aðra hóskandi útbúgving, men verður størsti denturin lagdur á :
- at umsøkjarin hevur royndir við børnum eins og royndir innan tað pedagogiska arbeiðsøkið
- at viðkomandi hevur hug og evni at arbeiða við børnum og familjum við serligum tørvi
- at umsøkjarin er búgvin og kann arbeiða sjálvstøðugt og er opin fyri menning í arbeiðnum

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið kann verða full- ella partíð og verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, Fíggjarmálastýrið og Kommunala Arbeiðsgevarfelagið. Skipað verður fyri ráðgeving, kollegiala supervisión og skeiðvirksemi.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Birgit Debess, leiðara á Stuðulsfólkaskipanini ella Eyðun Jensen, sosialdeildarleiðara tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. mai 2003. Viðmerk á umsóknina "Stuðulsfólkaskipanin"

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Dagstovnurin á Hamrinum**

Á Dagstovninum á Hamrinum fara at ganga 60 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari og 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari.

Á stovninum eru 12 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum og har tú fært høvi at gera tína ávirkan

www.torshavn.fo

# Pedagogar til Dagstovnin á Hamrinum

Tórshavnar kommuna søkir eftir 3-4 pedagogum 30-40 tímar um vikuna og 4 hjálparfólkastørv 40 tímar um vikuna. Pedagogstørvini verða sett 15. mai 2003. Hjálparfólkastørvini verða sett seinni.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Elisabeth Henriksen, leiðara, tlf. 225784 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. mars 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur á Hamrinum".